

# Føroyar mítt land

Aftur hesa vikuna vóru fimm áhugaverd evni umrødd í sendirøðini "Føroyar mítt land", sum er á Rás2 hvønn gerandisdag. Evnini, sum vórðu umrødd í sendirøðini í hesi vikuni, og sum høvi verður at endurhoyra sunnudagin klokkan 13, vóru: útróðrarsøga; mishalgidagar og siðir og skikkir í sambandi við teir; føroyski tjóðbúnin – hesa ferð um tað bæriligu stavnhettuna og húgvuna; brot úr Vága bilsøgu; umframt gamlir føroyskir matsiðir. Tey, sum løgdu sendingarnar til rættis, vóru: Andreas Andreasen, Janus Mohr, Nicolina Jensen Beder, Eirikur Lindenskov og Kristianna Rein.

Rás2, sunnudagin klokkan 13.

**Føroyar mítt land í næstu viku:**
30/6 Turið Sigurðardóttir
1/7 Janus Mohr
2/7 Nicolina Jensen Beder
3/7 Eirikur Lindenskov
4/7 Ólavur Clementsen

Hvønn gerandisdag kl.8, kl.9, kl.22 og kl.23, (týsdag tó 2230)

# CSI er populerast

Summi minnast Dallas, onnur Beverly Hills, og nógv eisini Baywatch, men nú er tað ein krimirøð, sum er mest sædda sjónvarpssendin í heiminum. Sambært The New York Post er tað røðin CSI, sum tað verður hugt so dúgliga eftir í sjónvarpi kring allan heimin. Mett verður, at umleið 84 milliónir fólk hugdu eftir røðini í fjør. CSI finnist í trimum ymiskum útgávum. Í hølunum á CSI – men væl aftanfyri - eru Desperate Housewives við meira enn 60 milliónum hyggjarum, og á triðja plássi er Glamour við26 milliónum . Tónleikakappingin American Idol er mest sædda røði í USA, men hon er ikki við á listanum hjá amerikanska blaðnum, tá ið tað snýr seg allan heimin.

